*Árni Olafsson, formaður í Oljuráðleggingarnevndini:*

# Uppskot til kolvetnis-lóggávu er nú liðugt

*-og verður latið landsstýrinum, áðrenn 1. juli. Harafturímóti verður uppskot til 1. útbjóðingarumfarið ikki lagt fyri landsstýrið fyrr enn til heystar*



*Ein stórur partur av Olju ráðleggingarnevndini við at leggja seinastu hond á frágreiðingina til landsstýrið.*

JAN MULLER

Frágreiðingin frá Oljuráðleggingarnevndini, sum helst verður karmurin um framtíðar føroyska oljupolitikkin, er nú um at vera heilt liðug. Nevndin hevur havt fund alla hesa vikuna og eftir hesar fundirnar skuldi ikki vera størvegis eftir av skriviarbeiði til lógaruppskotið, sum nevndin kemur við, frættir Sosialurin.

Árni Olafsson, formaður í nevndini sigur, at danska útgávan av frágreiðingini er so gott sum liðug og farið er nú at føroyska hana.

Ætlanin er at handa løgmanni fyrsta eintakið av frágreiðingini fyri 30. juni. Talan verður um einar 200 til 300 síður ella meira.

Í frágreiðingini er eitt uppskot til lógarkarm. Til hetta uppskotið eru nakrar sera nágreiniligar og drúgvar viðmerkingar.

## Markið ikki komið uppá pláss

Formaðurin í Oljuráðleggingarnevndini sigur, at upprunaliga var ætlanin at lata landsstýrinum eitt uppskot til 1. útbjóðingarumfar saman við lógaruppskotinum, men nevndin hevur nú valt at bíða við hesum til heystar.

Ein orsøkin til hetta er tann, at vit halda tað ikki vera sera praktiskt í løtuni at leggja okkum fastar á, hvørji øki verða boðin út.

Uppá fyrispurning um tað er marknatrætan við bretar sum spøkir sigur Árni Olafsson, at nevndin líka síðani 1993 hevur gjørt vart við, at hesin spurningur er ein veruleiki, sum ein má taka hædd fyri.

Men sjálvandi hava vit arbeitt í tí treysti, at marknaósemjan fór at verða loyst, áðrenn vit komu so langt, men tað er hon ikki. Beint nú - og síðani 2. apríl - er tann støðan so ógreið, sum hon uppá nakran máta kann vera.

Árni Olafsson sigur víðari, at nevndin hevur skilt á politikarunum, at teir fegnir vilja hava tað, sum kann gerast liðugt nú, og tí fáa teir tað í næstum.

## Ikki nógv seinkað kortini

*Merkir hetta eina seinking í tíðarætlanini fyri 1. útbjóðingarumfar?*

-Vit hava roynt at arbeiða á ein slíkan hátt, at tað ikki skuldi blivið til nakra munandi seinking. Vit kunnu við sera stuttari ávaring gera restina liðugt.

Árni Olafsson sigur annars, at tá teir eru liðnir við frágreiðingina til landsstýrið um sjálvan lógarkarmin, verður hildið fram við at gera tilfarið til 1. útbjóðingarrunduna liðugt.

*-Men er tað óheppið at fara undir eitt útbjóðingarumfar uttan at hava fingið markið uppá pláss?*

Sjálvandi høvdu vit staðið nógv betur og kunnað disponerað nógv fríari og yvir økjum, sum oljuvinnan eisini hevur áhuga í, um markið varð komið uppá pláss. Men soleiðis er tað ikki gingið.

*Hvørji eru signalini úr Bretlandi?*

-Eingi.

*Undrar tað teg?*

-Nei, enn er so lítið útliðið síðani ráðharraskiftið. Men vit bíða.

## John Battle ábyrgd av marknamáli

Formaðurin í Oljuráðleggingarnevndini er annars ikki heilt greiður yvir, hvør í bretsku stjórnini fer at hava ábyrgdina av marknatrætuni, nú ein Labourstjórn hevur tikið við. Hann roknar við, at nýggi orkumálaráðharrin John Battle verður ein av ráðharrunum, sum fer at taka sær av málinum, men hvør í uttanríkisráðnum fer at hava ábyrgd av málinum er formaðurin í Oljuráðleggingarnevndini og føroysku samráðingarnevndini um markið ikki greiður yvir.

Sosialurin hevur roynt at kannað málið og hava vit frætt, at personurin í uttanríkisráðnum við ábyrgd fyri marknaósemjuni er Tony Lloyd, sum er varauttanríkisráðharri. Tað var henda sessin, sum Joyce Quin, ið Sosialurin hevði samrøðu við valdagin, hevði í skuggastjórnini. Málsøki hjá tony Lloyd er „Aviation and Maritime matters".

Sosialurin skilur annars, at tað verður lagt stórt trýst á stjórnina at fáa eina loysn í marknatrætuni, tí oljuídnaðurin kennir seg ótryggan við støðuna, sum nú hevur staðið við í alt ov mong ár.

## Ráðstevna í Norðurlandahúsinum

Um góðar tvær vikur verður skipað fyri eini ráðstevnu í Norðurlandahúsinum um oljuvinnu, fiskivinnu og ídnað.

Vit hava spurt formannin í Oljuráðleggingarnevndini, um tað er gott at taka slíkt evni til viðgerðar nú?

-Tað er í hvussu er eitt evni, sum vit hava halgað einum rættuliga drúgvum kapitli í okkara frágreiðing.

Heldur Árni Olafsson, at ein vandi er í, at vit í viðgerðini av oljumálinum heilt gloyma at loysa trupulleikarnar í fiskivinnuni!

-Tað er ein vandi í, at prátið um fuglarnar á takinum tekur áhugan burtur frá teimum tú hevur í hondini. Tí so ómetaliga áhugaverd er ein oljuleitingarfasa fíggjarliga heldur ikki fyri hetta landið sigur formaður í Oljuráðleggingarnevndini við Sosialin.



*Frá fundum í Oljuráðleggingarnevndini*

**Útleiguamboð**

Kompressarar
Bonmaskinur
Brekkarar
Borar/Meitlar
Slangur
Vibratorar
Forskalling
Hátrýstreinsarar

Fæst til leigu

**Kaj Andreasen Pf.**
Kingran 5 · Hoyvík · Tlf 15600

**BETONG SAGING!**

*Vit saga...*

**ALLAR SKURÐIR**
(dýpi 55 cm t.d.:
HURÐA-/VINDEYAOP
o.a.
**EISINI HOL** upp
til 30 cm/diam, t.d.
til rørleiðingar, ventilatión o.a.

Geva fegnir **TILBOÐ!**
– bæði vanl. húsaánarum, virkjum, byggi- og vvs-fyritøkum

**FØROYA BETONG SAGING** v/ Hjaltur Tausen
Postsmoga 67 · Gerðisvegur
620 Runavík
Tlf. 47543 • Fax 48898
*Koma um alt landið!*

**BILLUTIR**
útvegast til
FLEST ALLAR
BILAR
**Fa. BILLUTIR**
Tlf. 21605 Fax. 21666

Pizzaria
Tlf. 18866
*Night and day*
*Ringið og bíleggið*
PIZZA á tlf. 18866
Opið er soleiðis:
Mánadag-hósdag
frá kl. 17–11.00
Fríggjad.-leygardag
frá kl. 17–07
Sunnudag
frá kl. 17–11.30
**PIZZARIA**